# KANNA STREYMIN INNI Í SVARTKJAFTATROLI

**FLÓTITROL | Sum liður í norðurlendskum granskingarsamstarvi er Fiskirannsóknarstovan farin at kanna streymin inni í flótitroli. Málið er at finna útav, um streymurin har afturi í trolinum minkar so nógv, at svartkjafturin steðgar á og harvið kann rýma úr trolinum.**




**FRÓÐI SKÚVADAL**
lívfrøðingur


Leingi hevur verið hildið, at streymurin inni í flótitroli minkar, so hvørt sjógvurin ferðast frá stórmeskaða fornetinum aftur í trolið, har meskarnir blíva minni og minni. Hetta kann ávirka svartkjaftin, so hann steðgar á, har streymurin blívur so lítil, at sjógvurin fylgir trolinum. Ger hann tað, so er vandi fyri at svartkjafturin loypir á meskarnar og fer úr trolinum, áðrenn hann nakrantíð kemur aftur í posan.

Fiskirannsóknarstovan er við í norðurlendskum samstarvi um gransking í flótitroli, og hevur í hesum sambandi mátað streymferðina inni í flótitroli. Fyrsta stigið varð tikið í fjør, tá fólk frá Fiskirannsóknarstovuni vóru ein túr við norska havrannsóknarskipinum G.O. Sars, har ferðmátingar vórðu gjørdar inni í einum lítlum flótitroli. Sambært mátingunum, ið vórðu gjørdar við Doppler-útgerð, er eingin munur millum streymferðina við høvuðlínuna og streymferðina framman fyri posan.

Næsta stigið var at kanna streymin inni í trolinum. Fólk frá Fiskirannsóknarstovuni vóru í februar ein túr við Fagrabergi fyri at kanna, hvussu sjógvurin ferðast inni í einum stórum svartkjaftatroli. Hesar mátingar vórðu gjørdar við Doppler-útgerð, sum mátar ein profil tvørtur gjøgnum trolið.

**Úrslitið**

Royndirnar inni í trolinum hjá Fagrabergi henda túrin í februar vístu, at stórur munur er á streymferðini við høvuðlínuna og ferðini stutt framman fyri posan á trolinum. Sambært mátingunum er streymferðin inni í trolinum, stutt framman fyri posan, bara ein triðing av streymferðini við høvuðlínuna. Orsøkin til stóra munin kann vera, at svartkjaftaposar eru sera langir og tungir við dupultum neti og 40 mm meskum í innara netinum. Tí verður sjógvurin møguliga drigin við trolinum og verður ikki sílaður út í sama mun sum longur frammi í trolinum. Fleiri mátingar skulu gerast í 2008 og 2009. Hetta fyri at staðfesta endaliga, hvat ávirkar streymferðina inni í flótitrolum.



*Svartkjaftur, fastur í meskunum á troli.*

**Streymferð í svartkjaftatroli**




*Mátingar í svartkjaftatrolinum hjá Fagrabergi. Stórur munur er á streymferðini við høvuðlínuna og inni í trolinum, stutt framman fyri posan. Myndin vísir umleið ein tíma av einum háli, sum Fagraberg gjørdi í februar í ár.*